

Transocean Leader fann olju á Krafla-økinum.

# Statoil hevur funnið stóra oljukeldu vestanfyri Bergen

**Jógvan Hugo Gardar**

09.02.2015 - 09:53

Oljan.fo

Einar 150 kilometrar í ein beinan vestan frá Bergen hevur boripallurin Transocean Leader funnið meir olju og gass. Hetta boðar norska Oljefirektoratet frá í morgun.

Talan er um ein sokallaðan avmarkingarbrunn, har oljufeløgini royna at finna hvar markið gongur fyri aðrar brunnar í økinum. Hetta er fimta oljufundið á Krafla-økinum síðani 2011, og tað skal rúma millum 50,3 og 81,8 milliónir oljulíkar - talan er um bæði olju og gass í brunninum.

Tað er Statoil sum er fyristøðufelag á Kraftla við 50 prosentum av loyvinum, mevanDet norske og Svenska Petroleum Exploration hava 25 prosent hvør.

Irene Rummelhoff, ið er leitistjóri hjá Statoil í Norðsjónum, sigur at hetta er eitt stórt fund á einum øki sum ein longu veit nógv um. Við nýggja fundinum verður Kraftla-økið mett at geva millum 140 og 220 milliónir oljulíkar.

Boripallurin Transocean Leader, sum fann oljuna og gassið, hevur nú ikki fleiri uppgávur fyri Statoil.